LM-091/2023

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Argir, 05. januar 2024

Fylgiskjal 3

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt og uppskot til kunngerð um pantskipan fyri íløt

Niðanfyri eru viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni í:

Fylgiskrivi 1 uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt
Fylgiskriv 2 uppskot til kunngerð um pantskipan fyri íløt

Vinarligar

Sigga Jacobsen

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

**Fylgiskjal 1 uppskot til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt**

p. 1 §1 stk. 4. Ber til at nýta hugtakið “loyvishavarar” ístaðin fyri “innflytarar og framleiðarar”

P. 1 Aftaná §1 stk. 4 kundu verið eitt brot við allýsingum av til dømis

1. Rakstrargjald
2. Móttøka

P. 4 §12 Tað kann vera óheppi at nevna upphædd ( 0,50 kr ) í lóggávu, tí inflationsviðgerð kann gerast viðkomandi sum tíðin frálíður.

P. 4 §12 stk. 3 skal hetta skiljast sum at fram til 1. oktober 2025 verður tað einans IRF, sum er pantumsitari og at hetta kann broytast um kunngerðin broytist?

P. 7 1.3 Endamálið við uppskotinum, annað brot: “landsstýrisfólkinum” í staðin fyri “landsstýrismanninum”

P. 10 2.4 Avleiðingar fyri umhvørvið fyrsta brot: returprosentið var 88% í 2021 og 90% í 2022

P. 15 til § 4 fjórða brot: Er undantakið bara fyri at taka ímóti øllum íløtum? Skulu tey enn taka ímóti tí, sum tey sjálvi selja? Hvussu við matstovum og øðrum har man ikki fær íløtini, hvussu vera hesi avhenda til IRF/pantumsitaran?

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

**Fylgiskjal 2 uppskot til kunngerð um pantskipan til íløt**

P. 4 §8: tað kann hugsast, at hesar ásetingarnar um móttøkutíðir eru ov avmarkaðar til at nøkta tørv hjá fólki at kunna lata inn íløt bæði í og uttanfyri arbeiðstíð.